Dátuviðgerðaravtala

sbrt. § 43 í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin)

millum

Navn	
Bústaður	
Postboks	
Post nr. og býur/bygd	
V-tal	

eftir hetta "*dátuábyrgdarin*"

og

Navn	**P/F Januar**
Bústaður	Óðinshædd 13
Postboks	Postboks 30
Post nr. og býur/bygd	FO-100 Tórshavn
V-tal	V-tal: 601470

eftir hetta "*dátuviðgerin*"

sum hvør sær eru "*partar*" og saman eru "*partarnir*",

hava avtalað fylgjandi standardásetingar fyri at fylgja reglunum í dátuverndarlógini.

Tá P/F Januar útinnur váttanaruppgávur, undir hesum lógarásettu grannskoðanina umframt aðrar váttanir við vissu har vit avgerða endamálið við viðgerðini, er P/F Januar sum meginregla dátuábyrgdari av teimum upplýsingum, ið verða viðgjørdar sum partur av uppgávuni. Harumframt eru vit dátuábyrgdarar av okkara viðgerðum í samband við kunda- og veitarafyrisiting har vit avgerða endamálið við viðgerðini.

Tá P/F Januar veitir bókhaldshjálp, umframt aðra ráðgeving, fer viðgerðin vanliga fram eftir boðum frá kundanum. Í tílíkum førum er P/F Januar dátuviðgeri. Vit tryggja í hesum sambandi at bindandi dátuviðgerðaravtala verður gjørd millum Januar og kundan.

Hendan dátuviðgerðaravtala er einans galdandi um tann veiting ið P/F Januar útinnur fyri kundan viðførur at P/F Januar er dátuviðgerði hjá kundanum (dátuábyrgdaranum).

1. Innleiðsla

1. Hendan avtalan avger rættindi og skyldur hjá dátuviðgeranum, tá ið dátuviðgerin viðger persónupplýsingar fyri dátuábyrgdaran. Avtalan er gjørd, soleiðis at partarnir samstundis lúka treytirnar í § 41, stk. 2 í dátuverndarlógini.

2. Í sambandi við at P/F Januar er dátuviðgerði hjá einum dátuábyrgdara, viðgerð P/F Januar persónupplýsingar vegna dátuábyrgdaran í samsvari við hesa avtalu.

3. Um P/F Januar er dátuviðgerði hjá kundanum er treytað av tí veiting P/F Januar veitir kundanum. Er P/F Januar ikki dátuviðgerði hjá kundanum er hendan avtala ikki galdandi.

4. Veitingin og endamálið við viðgerðini er lýst í avtalubrævi millum P/F Januar og kundan.

5. Hendan dátuviðgerðaravtala og avtalubrævið millum P/F Januar og kundan eru innanhýsis atknýtt og kunnu ikki sigast upp hvør sær. Tó kann dátuviðgerðaravtalan endurnýggjast uttan at tað er neyðugt at gera nýtt avtalubræv.

6. Ásetingarnar í hesi avtalu ganga framum møguligar aðrar avtalur millum partarnar, sum hava líknandi ásetingar. Hendan avtala gongur ikki framum skyldur, sum dátuviðgerin hevur ella er álagdur eftir dátuverndarlógini ella aðrari lóggávu. Ásetingar í avtaluni skulu tulkast til fyrimuns fyri vernd av rættindum hjá tí einstaka.

7. Avtalan skal vera til taks, skrivliga, undir hesum elektroniskt, hjá báðum pørtum.

8. Henda avtalan loysir ikki P/F Januar sum dátuviðgerða, frá øðrum rættarligum skyldum, ið ganga frammum hesa avtalu.

2. Dátuviðgerin ger eftir boðum

1. Dátuviðgerin kann einans viðgera persónupplýsingar eftir skjalfestum boðum frá dátuábyrgdaranum.

2. Tær viðgerðir dátuviðgerðin fremur dátuábyrgdarans vegna, eru lýstar í avtalubrævinum millum partarnar. Dátuviðgerðin tryggjar at viðgerðin av persónupplýsingum, sum avtalan fevnir um, fer fram í einum tryggum umhvørvi. Dátuviðgerðin skal kunna dátuábyrgdaran áðrenn perónupplýsingar vera fluttar til annað triðjland uttanfyri Føroyar ella Evropiska Búskaparliga Samstarvið (EBS).

3. Dátuviðgerin boðar alt fyri eitt dátuábyrgdaranum frá, um dátuviðgerin metir, at eini boð frá dátuábyrgdaranum eru í ósamsvari við galdandi lóggávu.

4. Dátuábyrgdarin kann til eina og hvørja tíð geva dátuviðgera boð um fyribils at steðga viðgerð, um dátuábyrgdarin metir, at dátuviðgerin ella undirdátuviðgerin ikki viðger persónupplýsingar í samsvari við dátuverndarlógina ella hesa avtalu.

3. Undirdátuviðgerð

1. Tá ið dátuviðgerin nýtir undirdátuviðgera, skal dátuviðgerin í bindandi avtalu áleggja undirdátuviðgera at halda somu skyldur, sum eru álagdar dátuviðgeranum í hesi avtalu.

2. Avrit av viðkomandi ásetingum í avtalu við undirdátuviðgera og broytingar í hesum avtalum skulu eftir umbøn sendast dátuábyrgdaranum.

3. Í avtaluni við undirdátuviðgera skulu eisini vera ásetingar um at tryggja rættindi hjá dátuábyrgdaranum og skrásetta, í fall dátuviðgerin ella onnur millumlið fara á húsagang.

4. Dátuviðgerin hevur fulla ábyrgd mótvegis dátuábyrgdaranum av, at skyldurnar í hesi avtalu verða hildnar, sjálvt um tað er undirdátuviðgeri, sum ikki heldur sínar skyldur. Ábyrgdarbýtið ávirkar ikki rættindini hjá teimum skrásettu sambært dátuverndarlógini, undir hesum t.d. § 77 um endurgjald.

5. Undirveitarar, sum viðgera persónupplýsingar vegna dátuviðgeran og sum dátuábyrgdarin hevur góðkent eru:

NAVN	ADRESSA	LÝSING AV VIÐGERÐ
P/F Nema	Smyrilsvegur 5, Føroyar	KT Support
VISMA E-conomic A/S *(Bert bókhaldskundar)*	Langbrogade 1, Danmark	Bókhaldskipan
Revisionsgruppen Danmark	Ewaldsgade 3, Danmark	Góðskustýring
Microsoft 365	Kanalvej 7, Danmark	Skrivstovuforrit og hýsing

4. Trygd og trúnaður

1. Dátuviðgerin skal – óheft av dátuábyrgdaranum – meta um váðarnar við viðgerðini fyri tann skrásetta og seta í verk hóskandi tiltøk. Dátuábyrgdarin skal í tí sambandi veita dátuviðgeranum allar viðkomandi upplýsingar, so at dátuviðgerin er førur fyri at eyðmerkja og meta um váðan.

2. P/F Januar hevur sett í verk og viðlíkaheldur tøknilig og bygnaðarlig tiltøk fyri at verja kundadátur, herímillum persónupplýsingar og tryggja, at hesar ikki av tilvild ella ólógliga verða burturbeindar, burturmistar, broyttar, óheimilað givnar víðari ella at atgongd verður givin til persónupplýsingar, sum eru sendar, goymdar ella á annan hátt viðgjørdar av P/F Januar. Hesi tiltøk skulu verða ásett í einum yvirskipaðum KT-trygdarpolitikki hjá P/F Januar. P/F Januar skal eftir áheitan frá kundanum og í samband við skoðan geva kundanum innlit í yvirskipaða KT-trygdarpolitikkin og aðrar upplýsingar, ið kunnu verða viðkomandi fyri veitingina, ið P/F Januar letur kundanum, tó treytað av, at talan ikki er um trúnaðarligar upplýsingar ella upplýsingar, sum uppá aðrar mátar kunnu hótta yvirskipaðu KT-trygdina hjá P/F Januar, um hesar verða latnar øðrum uttanhýsis viðskiftafólki.

   - **Bronglan**: P/F Januar skal tryggja, at kundadátur sum verða viðgjørdar í teimum skipanunum, sum lýstar eru undir punkt 5 omanfyri, verða bronglaðar undir flutningi og undir varðveitslu.

- **Tilbúgving**: P/F Januar skal hava sett í verk tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, ið tryggja framhaldandi trúnað, rættleika og atgeingi til kundadátur. Hetta umfatar millum annað, evnir til rættstundis at fáa í rættlag atgeingi á upplýsingum eftir eina trygdarhending, við virknari trygdaravriting.

- **Eftirmeting**: P/F Januar skal hava sett í verk, eina mannagongd fyri regluliga royndarkanning, meting og eftirmeting av virkisførinum av teimum tøkniligu og bygnaðarligu tiltøkunum sum er ásett í hesari avtalu.

3. Dátuviðgerin skal viðgera allar persónupplýsingarnar frá dátuábyrgdaranum í trúnaði. Dátuviðgerin skal syrgja fyri, at starvsfólk hjá dátuviðgeranum, undirdátuviðgera og onnur hava bundið seg til trúnað ella eru bundin av hóskandi lógarásetingum um trúnað. Hesir persónar fáa bert atgongd til persónupplýsingarnar, um tað er neyðugt.

4. Listi yvir persónar, sum hava atgongd til persónupplýsingarnar, skal vera atkomuligur hjá dátuábyrgdara og gjøgnumgangast við jøvnum millumbili.

5. At hjálpa og stuðla dátuábyrgdaranum

1. Dátuviðgerin skal hjálpa dátuábyrgdaranum m.a. við at veita dátuábyrgdaranum upplýsingar um tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, sum eru sett í verk, og aðrar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at dátuábyrgdarin er førur fyri at halda sínar skyldur sbrt. §§ 46-52 í dátuverndarlógini og svara umbønum, sum skrásett seta fram sbrt. kapittul 4 í lógini.

2. Dátuviðgerin skal geva dátuábyrgdaranum allar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at vísa á, at §§ 41 og 42 í dátuverndarlógini og henda avtala verða hildnar, og skal fáa í lag og hjálpa til við skoðan, undir hesum kanningum, sum dátuábyrgdarin sjálvur ella triðipartur, sum er heimilaður av dátuábyrgdaranum, fremur. Møguligur kostnaður, ið P/F Januar hevur av einari skoðan í umhvørvinum hjá P/F Januar, skal dátuábyrgdarin bera. Áðrenn skoðanin fer fram, skal P/F Januar góðkenna vavið á skoðanini og teir persónar ella uttanhýsis veitara, ið fremja skoðanina.

3. Dátuviðgerin skal uttan óneyðugt drál og skjótast gjørligt boða dátuábyrgdaranum frá eftir at vera vorðin kunnugur við, at viðgerð ikki er í samsvari við dátuverndarlógina ella avtaluna.

6. At lata aftur og strika upplýsingar

1. Tá ið viðgerðin hjá dátuviðgeranum er endað, hevur dátuviðgerin og undirdátuviðgeri skyldu at lata persónupplýsingarnar aftur og strika øll avrit, um tað ikki er álagt í lóggávu at goyma persónupplýsingarnar. Váttan um hetta skal, eftir umbøn, latast dátuábyrgdara.

7. Broytingar í dátuviðgerðaravtalu

1. Sum partur av, at dátuverndarlógin ella dátuverndarsiðvenja kann verða fyri broytingum, tillskilar P/F Januar sær rættindi til, at dagføra sína dátuviðgerðaravtalu, ið verður tøk á heimasíðuni hjá P/F Januar.

2. P/F Januar hevur rætt til, at gera broytingar í nýtslu av undirveitarum, treytað av at dátuábyrgdarin 30 dagar frammanundan er kunnaður um ætlaðu broytingarnar. Móttekur P/F Januar einki mótmæli frá dátuábyrgdaranum innan 30 dagar eftir, at dátuábyrgdarin er kunnaður um ætlaðu broytingarnar, tillskilar P/F Januar sær rætt til, at fremja ætlaðu broytingarnar.

8. Gildiskoma og gildisslit

1. Avtalan kemur í gildi tann dagin dátuábyrgdarin hevur undirskriva avtaluna.

2. Báðir partar kunnu hvør sær krevja nýggjar samráðingar um ásetingarnar, um lógarbroytingar ella óskynsemi í avtaluni ger seg galdandi.

3. Avtalan er galdandi so leingi dátuviðgerin skal viðgera persónupplýsingar fyri dátuábyrgdaran. Í hesum tíðarskeiði kann henda avtalan ikki sigast upp, uttan so at aðrar ásetingar, sum snúgva seg um viðgerðina av persónupplýsingum, verða avtalaðar millum partarnar.

4. Er viðgerðin av persónupplýsingum endað, og upplýsingar eru latnar aftur ella strikaðar sbrt. pkt. 6, kann avtalan sigast upp av báðum pørtum hvør sær við skrivligum varningi á 24 vikur.

9. Undirskriftir

Dátuábyrgdarans vegna

Hendan avtala er at meta sum bindandi fyri dátuábyrgdaran tá heimilaður persónur frá dátuábyrgdaranum hevur undirskrivað avtalubræv við P/F Januar, treytað av at P/F Januar løgfrøðiligt er at meta dátuviðgerði.

Dátuviðgerðans vegna

Hendan avtala er at meta sum bindandi fyri P/F Januar tá heimilaður persónur frá P/F Januar hevur undirskrivað avtalubræv við kundan, treyta av at P/F Januar løgfrøðiligt er at meta dátuviðgerði.